## Tem liðugur í Lyngby

Tað er nógv, sum bendir á, at dagarnir hjá Tem Hansen í Lyngby eru taldir. Felagið og Tem Hansen, sum hevur verið á føroyska landsliðnum, eru vorðin samd um, at spælarin skal leita sær eftir nýggjum felag. Orsøkin er tann, at tað ikki hevur eydnast Tem Hansen at vinna sær pláss á besta liðnum í Lyngby.




## Jólakapping hjá ´SB

ÍSB skipar sunnudagin 30. november fyri svimjikapping í Klaksvík. 16 kappingar vera á skránni, men í kappingum, har bert ein ella tvær tilmeldingar eru, verður kappingin lagt saman, so bæði kynini kappast. Tó verður kappingin avlýst, um bert tveir luttakarar eru tilsamans. Øll við serligum tørvi kunnu luttaka, og tekningarfreistin er innan hósdagin. Sjálv kappingin byrjar klokkan 13, men upphitingin byrjar klokkan 12. Tey, ið hava tørv á hjálpara til umklæðingarrúmið mugu hava hjálpara við sjálvi. Meira um tiltakið á www.isb.fo

# Anorthosis søplaði søguligan sigur

**Chelsea hevur ikki tryggjað sær pláss í 1/8 finaluni enn. Inter fekk ein óvæntaðan kjaftfisk. Atletico, Liverpool, Barcelona og Sporting eru víðari**

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Liðið, sum iðrar seg mest í dag, er kýpriotiska sensasjónsliðið, Anorthosis Famagusta, sum gloymdi at binda um, tá teir vóru í odda 2-0 á heimavølli ímóti Werder Bremen.



*Lagt var upp til veitslu hjá heimaliðnum, men Werder Bremen oyðilegði dagin, tá teir vunnu seg aftur upp á 2-2 í útidystinum móti Anorthosis Famagusta*

*Mynd: Polfoto/AP*

### Bólkur A:

Chelsea hevur enn ein heimadyst til góðar ímót Rumensku Cluj, men meðan hinir ensku kappingarneytarnir í Onglandi, Liverpool, Arsenal og Manchester United kunnu fokusera uppá Premier League, so mál Chelsea fáa tað síðstu forðingina í Champions League av vegnum. Chelsea vóru ikki óheppnir at fáa javnleik 1-1 á útivølli ímóti Bordeaux ígjár. Chelsea skapti lítið í hesum dystinum, meðan heimaliðið hevði meira av málmøguleikum. Men tá franska liðið ikki vildi taka sínar kjansir, so tók Chelsea av, tá ein tími varð spældur av dystinum. Frank Lampard fangaði eina skeiva sending frá Bordeaux, og sendi bóltin fram til franska Chelsea-spælaranum, Nicolas Anelka, sum lættliga skoraði. Dysturin gjørdist deyðligur eina løtu, men tá 10 minuttir vóru eftir, kom veruligt lív í aftur. Alou Diarra slapp ótarnaður at skalla bóltin í Chelseamálið til 1-1. Seinastu løtuna kringsetti Bordeaux Chelsea-brotsteigin, men londonliðið hóraði undan. Tá 5 minuttir vóru eftir, varð Frank Lampard sendir av vøllinum, so nú má Chelsea vinna seg víðari uttan hansara hjálp.

Roma gagnnýtti javnleikin millum Bordeaux og Chelsea við at vinna 3-1 á Cluj í Rumenia.

### Bólkur B:

Spenningurin er eisini inntaktur í bólki B. Sensasjónsliðið av Kýpros, Anorthosis Famagusta hevði vitjan av týsku Werder Bremen. Leingi varð líkt til, at Anorthosis fór at vinna, og harvið togað seg uppá 8 stig. Tað byrjaði væl hjá Famagusta. Fyrst varð tað Nikos Nikolaou, sum skallaði eitt hornaspark í netið, og síðani varð tað Savio, sum gagnnýtti eina góða sendingi, og beindi bóltin í netið til 2-0. Tað løtuna varð tað jól niðri á Kýpros. Men týskarum líkt, so kom Werder Bremen aftur. Tá eitt korter varð eftir minkaði Diego um munin til 2-1 við einum brotssparki, og tá bert tríggjir minuttir vóru eftir javnaði Hugo Almeida, aftaná eitt forarbeiðið hjá Markus Rosenberg.

Í Milano væntaðu tey flestu, at Inter fór at seta tingini uppá pláss ímóti Panathinaikos, men grikkar vildu tað øðrvísi. Inter hevði nóg mikið av møguleikum til at vinna dystin, men Panathinaikos var einasta liðið, sum rakti málið. Einasta málið í dystinum, varð skotið av verjuspælaranum, Josu Sarriegi.

### Bólkur C:

Tað var verulig málveitsla í bólki C, har allar plasseringarnar í bólkinum fullu uppá pláss í gjárakvøldið. Shaktar hevði møguleikan at tryggja sær 3. plássið, og rættin til at taka lut í UEFA Cup, og tann møguleikan tók ukrainska liðið ímóti sveisiska FC Basel. Jadson skeyt hattrick fyri Shaktar.

Sporting Lissabon og FC Barcelona møttust í hinum dystinum, fyri at kunna seta uppá pláss, hvør skuldi vinna bólkin. Lionel Messi gjørdi forarbeiðið, so Thierry Henry kundi skora eitt av sínum sjáldsomu málum fyri Barcelona, tá eitt lítið korter varð farið. Íslendski, Eiður Gudjohnsen varð við í forarbeiðnum, tá Gerard Pique økti til 2-0, sum gjørdist hálvleiksstøðan. Tá Lionel Messi økti til 3-0 í 49. minutti hildu tey flestu, at nú var leyst og liðugt. Men við tveimum skjótum málum hjá Miguel Veloso og Liedson kom Sporting uppá 2-3. Men minuttin seinni ger Caneira hjá Sporting eitt sjálvmál, og so fór spenningurin úr aftur dystinum. Bojan Krkic gjørdi síðani arbeiðið liðugt fyri Barcelona.

### Bólkur D:

Liverpool knógvaði Marseille við einum máli, tá saman um kom. Tá 23 minuttir vóru farnir slapp Steven Gerrard at standa fullkomuliga ótarnaður inni í brotsteiginum, og stútaði hann bóltin í netið til 1-0. Aftaná hetta varð tað heldur langt ímillum málmøguleikarnar, men Rafael Benitez kundu kortini fegnast um úrslitið og, at Liverpool kann seta fult fokus á Premier League næstu vikurnar.

Dysturin millum Atletico Madrid og PSV á Vicente Calderón Leikvøllinum í Madrid gjørdist eitt sindur margháttligur. UEFA hevur revsað Atletico, og máttu teir spæla uttan áskoðarar ígjár. Nakrir hundrað Atletico-fjepparar stóðu uttanfyri stadionøkið og sungu, og við tí tøgn, sum varð, so hoyrdust teir inn á leikvøllin. Atletico hevði longu staðfest sína víðari luttøku í Champions League, tá 28 minuttir vóru spældir. Simao skoraði aftaná 14 minuttir, og 14 minuttir seinni økti Maxi Rodriguez til 2-0. Koevermans skoraði fyri PSV tíðliga í 2. hálvleiki, men meir bleiv tað ikki til hjá hollendska liðnum.

**Støðan í bólkaspælinum**

**Bólkur A**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Roma | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 10 | 6 | 4 | 9 |
| 2 | Chelsea | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 3 | Bordeaux | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 5 | 9 | -4 | 7 |
| 4 | CFR Cluj | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 4 | 7 | -3 | 4 |

**Bólkur B**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Inter | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 8 |
| 2 | Panathinaikos | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 7 | 7 | 0 | 7 |
| 3 | Anorthosis F. | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 8 | 7 | 1 | 6 |
| 4 | Werder Bremen | 5 | 0 | - | 4 | - | 1 | 5 | 8 | -3 | 4 |

**Bólkur C**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Barcelona | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 16 | 5 | 11 | 13 |
| 2 | Sporting L. | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 7 | 8 | -1 | 9 |
| 3 | Shakhtar D. | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 8 | 5 | 3 | 6 |
| 4 | Basel | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 2 | 15 | -13 | 1 |

**Bólkur D**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Atletico M. | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 9 | 4 | 5 | 11 |
| 2 | Liverpool | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 8 | 4 | 4 | 11 |
| 3 | Marseille | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 5 | 7 | -2 | 3 |
| 4 | PSV Eindhoven | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 4 | 11 | -7 | 3 |

**Bólkur E**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Manchester Utd | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 7 | 1 | 6 | 9 |
| 2 | Villarreal | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 9 | 5 | 4 | 9 |
| 3 | AaB | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 7 | 12 | -5 | 5 |
| 4 | Celtic | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 2 | 7 | -5 | 2 |

**Bólkur F**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Lyon | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 12 | 7 | 5 | 11 |
| 2 | Bayern München | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 11 |
| 3 | Fiorentina | 5 | 0 | - | 3 | - | 2 | 4 | 8 | -4 | 3 |
| 4 | Steaua B. | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 3 | 11 | -8 | 1 |

**Bólkur G**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Arsenal | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 11 | 3 | 8 | 11 |
| 2 | FC Porto | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 7 | 8 | -1 | 9 |
| 3 | Dynamo Kiev | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 3 | 4 | -1 | 5 |
| 4 | Fenerbache | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 4 | 10 | -6 | 2 |

**Bólkur H**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Juventus | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 11 |
| 2 | Real Madrid | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 6 | 5 | 1 | 9 |
| 3 | Zenit Petersborg | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 4 | 4 | 0 | 5 |
| 4 | BATE Borisov | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 3 | 8 | -5 | 2 |